# Sólskinssøga um svartkalvagørn

**– Um hálvar og heilar bandittar:**

ÓLI JACOBSEN



Í Oyggjatíðindi mikudagin er ein grein, har Jan Højgaard, formaður í fiskimannafelagnum, skírir sín mótpart Viberg Sørensen, formann í reiðarafelagnum fyri at vera ”hálvan banditt”. Grundgevingin er, at ”Fiskimannafelagið gjørdi skipini út hjá honum, men at felagið hevði ringt við at fáa pengarnar aftur.”

Nú viðvíkir hetta viðurskifti í míni tíð í FF, og er hetta eitt mál, sum eigur at verða lýst til fulnar.

Samstundis lýsir hetta munin á tí hugburði, sum tá FF stóð og nú stendur fyri.

Forsøgan um hetta mál er henda:

Umleið 1990 vóru tveir spanskir veiðutjóvar tiknir undir Føroyum. Tað vísti seg, at teir høvdu fulla last av havtasku, sum var veidd við gørnum.

Hetta var ein veiðumøguleiki, sum føroyingar ikki høvdu vitað av. Men tað var skjótt, at teir fóru at royna hetta, og ein tann fyrsti var Viberg.

Í 1993 vóru sáttmálasamráðingar millum FF og FR. Hetta var í ringastu krepputíðini, tá ið einki bar til. Viberg var tá nevndarlimur í FR. Hann hevði eina trúgv uppá, at tað eisini kundi bera til at veiða svartkalva við gørnum. Her kravdust onnur gørn enn til havtasku, men eingin banki vildi fíggja eitt slíkt stig.

Tá segði FF, at hesum skuldi ikki standa á, og felagið vildi fíggja keyp av svartkjaftagørnum.

Hetta riggaði sera væl. Tað var væl at fáa, og væl kom burtur úr hjá báðum pørtum. Hetta útvegaði arbeiðspláss bæði á sjógvi og landi. Hetta var ein sólskinssøga frá hesi krepputíð. Hetta var eisini eitt gott dømi um eitt konstruktivt fakfelag, sum á hendan hátt kundi vera við til at skaffa veiðumøguleikar og harvið arbeiðspláss til gagns fyri fiskimenn og samfelag.

Hetta er ein søga, sum í høvuðsheitum er positiv. Men vegna viðurskifti millum Viberg og og FF, sum eru avgreidd langt áðrenn tíðina hjá Jan í FF, verður hetta mál nú lýst á ein hátt, sum í høvuðsheitum er negativur.

Á heimasíðuni hjá FF stóð einar tveir dagar ein jánkaslig umbering frá Jan Højgaard, har hann váttar, at hann ikki hevur skil á, hvat hann sjálvur sigur.

At hetta eru lótir sæst av tí, at henda umbering als ikki eru komin í blaðnum, har ákæran varð sett fram, og har hon tí hoyrir heima.

Tað er eisini greitt, at her er als ikki talan um nakað mistak. Longu í januar frættist somu tíðindi frá eini skipsmanning, og hon kann bert vera komin eina staðni frá. Okkurt meira uppbyggjandi mátti verið uppgávan hjá einum nýggjum formanni.

Slík mannagongd er í hvussu er nýskapan í fiskimannafelagnum. Tað gongur eisini sjón fyri søgn, hvat ið kann fáast burtuúr hesum hugburði at leggja øll í samfelagnum undir at vera hálvar og heilar bandittar, sum eisini er høvuðsinnihaldið í 4-5 síðurs ársfrágreiðini hjá felagnum fyri seinasta ár.

# Kristina Háfoss/Bill Justinussen

JÓGVAN E. ÓSÁ



Hettar verður skrivað til tykkum, tí tit eru mentamálaráðharri og formaður í Løgtings mentanarnevnd.

Og beinanvegin. Hettar er ikki skrivað ímóti Tjóðpalli Føroya. Bert ein heilsan, áðrenn málið fer heilt av sporinum.

Vit sóu mentamálaráðharran hyggja upp á umstøðurnar hjá Leikpalli Føroya – og tær eru avgjørt ikki góðar. Man kann næstan siga, at tað var skomm at síggja, hvussu vánaligt tað er.

Men eg vil tó líka minna á, at sjónleikur í Føroyum er ikki bara Tjóðpallurin – hóast hann – og eigur – telur nógv.

Uttan at reypa, so haldi eg, at eg havi skil fyri hesum. Havi verið við síðan 1979 – fyrst í MáF – 15 ár í Leikpalli Føroya – og nú aftur í MáF.

Og tað er so, at áhugaleikur er púrasta burturgloymdur hesi seinastu árini.

Stuðulin hevur tey seinastu árini verið 750.000 krónur. Og har vísir tað seg, at hann verður standandi.

Men tær krónurnar “minka” fyri hvørt ár – tí alt verður dýrari og dýrari.

Fyri tær fáu krónur, ið vit fáa, royna vit at veita stuðul til áhugafeløgni – og hava skeið á hvørjum ári – upp til fleiri, fyri at gera okkum dugnaligari.

Seinasta vikuskiftið varð skipað fyri scenugrafiskeiði – um tað at smíða og gera pall til sjónleik – á Viðareiði, har eini 15-20 fólk luttóku. Vit høvdu danskan lærara – og spyr tey, ið luttóku, hvussu væleydnað tað var – og hvussu nógv tey lærdu.

Í døgunum 30. apríl – 4. mei verður skipað fyri Leiklistarskúla á Føroya Fólkaháskúla, har undirvíst verður í Leiklist (15 fólk), leikstjórn (9 fólk) og At skriva til pall (7 fólk).

Sum lærarar verða trúggjar navnframir – og dugnaligir íslendarar.

Men ikki tykkum at siga. Tað kostar.

Vit prioritera tað høgt, at vit gerast betur og betur – og tað er eitt fantastiskt sjálvboðið arbeiði, ið liggur aftan fyri hvørt einasta projekt, ið áhugaleikarar skipa fyri.

Eisini “satsa” vit uppá, at vit fáa føroysk leikrit, ið er ein “mangulvøra”.

Vit ynskja ikki, at taka frá nøkrum – men bert, at vit eisini kunnu “líva” .

Eg var ein av teimum, ið arbeitti fram í móti at fáa Tjóðpall Føroya settan á stovn. Bæði sum nevndarlimur í MáF og sum nevndarlimur í Leikpalli Føroya – og nú aftur í MáF, tilsaman nú í 29 ár.

Men eg má siga sum er. Eg eri ógvuliga skuffaður.

Tí síðan Tjóðpallurin var settur á stovn, eru vit bert gjørd minni og minni. Ikki tí at tey eru ov stór – men tað verður ikki virðismett, tað arbeiði, ið áhugaleikarar gera.

Og sum ein tók til á seinasta aðalfundi hjá MáF. Ongin byrjar sína sjónleikarakarrieru á Tjóðpallinum. Tað verður byrjað úti í áhugafeløgunum.

Øll, ið eru í Tjóðpallinum í dag og tey sum hava verið har – frá stjóra til leikarar – eru byrjaði í einum áhugafelagi.

Og verður áhugaleikurin ikki lív lagað, doyr allur sjónelikur í Føroyum.

Og tað var væl ikki meiningin?

PS: Nær verður Leiklistarráðið mannað av nýggjum?? So vítt eg veit, átti tað at verið gjørt fyri langari tíð síðan.

# Útbyggingar hjá Tórshavnar havn

**Áhugafelagið Bygdabjarging**

*v/ Høgna Johansen, Olga Johansen, Per G. Pedersen, Ingun Helmsdal, Evald Joensen, Martina Sørensen Signabøur. Anna Arabo, Thomas Arabo Oyrareingir*

Havnin er frá náttúrunar hond brimpláss. Gjøgnum tíðina so hevur tað eydnast at fingið Eystaru og Vestaru vág rímuliga kyrrar. Hugsjónin um at Tórshavnar Havn skuldi blíva ein stór góðshavn, hon hevur spælt fallit. Úrslitið er, at vit í dag hava eina stórt sæð óbrúkiliga havn á Sundi og eina líka óbrúkiliga havn á Skansabogunum. Nú er so túrurin komin til at gera eina óbrúkiliga havn á Oyrareingjum.

Gud viti hvussu leiðslan í Tórshavnar Havn hugsar tá ið teir útbyggja.

Vit minnast øll ta tíðina, tá ið Smyril og Norrøna vóru í gerð. Tá var ein ætlan gjørd, har bæði skipini skuldu liggja á Bursatanga í senn við afturendanum inn ímóti Kongabrúnni. Nú skipini eru komin, so duga øll at síggja vitloysi í hesi ætlanini.

Tað sum kanska er meira ørkymlandi er, at tað var ikki vit og skil í Tórshavnar Havn, ið steðgaði ørskapinum, men ein friðingarnevnd.

**Fyrsta “næstan vanlukkan” á Kollafirði**

Útbyggingin á Oyrareingjum er ørskapur út frá so nógvum sjónarmiðum.

Hyggja vit fyrst eftir teimum teknisku fortreytunum, so er ógvuliga trongligt og veðurhart, og økir har tað er veruligt dýpi til stór skip er ógvuliga avmarkað, so her er ikki nógv at geva út av um allar manøvrur ikki rigga perfekt.

17. februar høvdu vit so tí fyrstu “næstan vanlukkuna“. Hugtakið verður brúkt í flogferðsluni. Um teir hava eina slíka, so verða kanningar settar í verk, so støðan ikki skal endurtaka seg.

Hendingin var í stuttum hendan. Ein stórur trolari kom inn gjøgnum fjørðin. Nakað úti á byrjar hann at floyta áhaldandi. Skipið hevði hampuliga ferð og týðuligt var, at tað fekk ikki steðgað. Tá tað kom inn ímóti kaiini, lá eitt annað far fyri. Tíbetur var motorurin í gongd og manning umborð. Hettar farið fekk so akkurát smoygt seg út undan gronini á togaranum, ið enduliga steðgaði næstan uppi á landi. Tá ið hesin so skuldi flyta á tað plássið, hann uprunaliga hevði ætlað sær, sá tað út sum hann stóð á botni aftan.

Her vóru vit so sekundir og nakrar fáar metrar frá einari vanlukku, ið kundi spilt okkum allan fjørðin.

Eingin hevur lætist um vón um hendingina. Hon er helst “feiað” undir eitt ella annað gólvteppi, sjálvt um heilt greitt átti at verið kannað nærri.

**Árin á búplássið – larmur**

Hyggja vit so at tí árini, ið hendan útbyggingin hevur á búfólkið, ið býr rundan um, so er tað ikki smávegis. Hettar sama kvøld sum umrødda hending fór fram, komu onnur skip inn og í tvey døgn var tað sum at sova í einum maskinrúmi.

Ikki tí at hettar hevur verið lívið nú í nøkur ár, men hettar kvøldið bar av.

Nú eru so ljóðmátingar gjørdar. Hesar verða nú mettar av kønum fólki og sammettar við lógarkrøv her og aðrastaðni, og okkurt bendir á, at leiðslan í Tórshavnar Havn er í ferð við at fáa sína triðju ónýtuligu havn.

**Árin á búplássið – dálking**

Og so er tað dálking. Vit ganga so frelst og seta roykiforboð allastaðni, har vit kunnu koma til tað, tí sigaretroykur dálkar. Samstundis góðtaka vit, at bæði Kadlbaksfjørður og Kollafjørður í góðum veðri eru bláðir av tungoljudieselroyki – mest vandamikli dieselroyki yvirhøvur.

Ein fantastiskur dupultmoralur!

Ímeðan strong krøv verða sett til spillvatni frá Vestsalmon, so verða kontainarar vaskaðir í fjørðuni akkurát sum tað bara hoyrir til. Eingin veit hvat hevur verið í áðrenn.

**Niðurstøða**

Alt hettar projektið hjá Tórshavnar Havn er eitt dømi um eina ómetaliga vanvirðing av teimum, ið búgva runt fjørðin. Tað er bara ein spurningur um tíð, nær okkurt heilt álvarsamt hendur. Tá nyttar lítið at standa og gráta um, at vit og skil ikki bleiv brúkt.

Tá ið landsins lógir, ið skulu gagna borgarunum verða mettar sum foringar hjá kommunum, tá er etiska støðið vorðið ov lágt.

Ikki tí alt hettar meir og minni systematiska svansið við at byggja “hálvar havnir“ fyri hundraðtals milliónir, kemur nokk at forbjóða seg sjálvt.

Tórshavnar Býráð má nokk síggja í eyguni, at vinnuøkini inni í firði í Kollafirði ikki kunnu nýtast til annað enn vanligt ídnaðar og tænastuvirksemi.

Bygdabjarging er áhugafelag hvørs endamál er at varveita og tryggja góð livilíkindi í bygdunum í Tórshavnar kommunu.

Serligur dentur verður lagdur á at steðga virksemi, ið larmar, dálkar ella í aðrar mátar nervar, og fær livilíkindini í bygdunum at versna bæði fyri fólk og fæ.

Felagið hevur í dag omanfyri 150 limir.